UTTAN ÚR HEIMI

## Búseting hóttir demokratiið

Ein týðandi amerikanskur diplomatur ávarar nú um, at jødisku búsetingarnar á Vestara Áarbakka kunnu gerast ein hóttan fyri Ísrael sum eit demokratiskt samfelag.

William Burns, sum er aðalskrivari í amerikanska uttanríkisráðnum, segði á einari ráðstevnu mánadagin, at tann áhaldandi jødiska búsetingin í teimum arabisku økjunum og serliga á Vestara Áarbakka ger, at tað er torført at síggja, hvussu tað skal bera til at skipa eitt palestinskt ríki við síðuna av tí ísraelska.

- Tað er ein sannroynd, at alt fleiri og fleiri fólk seta seg niður í teimum palestinsku økjunum. Tey fáa dyggan stuðul frá ísraelsku stjórnini, sjálvt um búsetingin er ein álvarssom byrða fyri landsins búskap. Hinvegin er tað ein sannroynd, at tey landafrøðiligu viðurskiftini sum frá líður kunnu gerast ein hóttan fyri Ísraels framtíð sum eitt demokratiskt jødiskt ríki, segði William Burns á ráðstevnuni, sum var í Detroit, og sum snúði seg um handil og samstarv millum USA og tey arabisku londini.

## Keypa sprutt í Danmark

Í dag fellur prísurin á rúsdrekka í Danmark, og longu nú er greitt, at sviar í stórum tali fara at leita sær til Danmarkar at keypa sær sterkan løg, tí hann er væl dýrari hinumegin Oyrasund.

Ferjurnar, sum sigla millum Helsingborg og Helsingør, hava havt úr at gera seinastu dagarnar at selja ferðaseðlar til sviar, sum vilja sleppa vestur um sundið at keypa sær rúsdrekka. Samstundis siga handlarnir í Helsingør og aðrastaðni á Sælandi, at sjáldsama fáir sviar hava verið har í seinastuni, og hildið verður, at teir heldur velja at bíða, til teir kunnu fáa bíligari rúsdrekka.

Tey, sum selja rúsdrekka, rokna tí við munandi størri sølu teir næstu dagarnar, tí í dag kostar ein fløska av vanligum rúsdrekka upp í 50 krónur minni enn í gjár. Ja, summir handlar vænta at tvífalda søluna, skrivar Jyllandsposturin.

## Ætla at leggja saman

Alt bendir nú á, at franska flogfelagið Air France og tað niðurlendska KLM verða løgd saman í eitt felag.

Mánakvøldið samtykti nevndin í Air France at góðkenna samanleggingina, og sum skilst skal endalig støða takast til málið um fjúrtan dagar. Eftir tí, sum nú liggur á borðinum, skulu partaeigararnir í Air France i80 prosent av tí samanlagda felagnum. Fakfeløgini hjá teimum, sum arbeiða hjá Air France, eru ikki serliga fegin um ætlanina, tí tey bera ótta fyri, at samanleggingin fer at kosta fleiri arbeiðspláss, skrivar NTB.

Verður samanleggingin veruleiki, verður tað nýggja flogfelagið tað triðstørsta í heiminum aftan á American Airlines og Delta. Italska flogfelagið Alitalia er sinnað at gerast partur av nýggja felagnum, men fyribils havs fransmenn og niðurlendingar víst italska tilboðnum frá sær. Tað er tó ikki óhugsandi, at Al Italia kann gerast partur av nýggja felagnum seinni.

## Blitzið útvegaði hjálp

Tveir bretskir fjallaklatrarar, sum vóru vilstir í Dolomit-fjøllunum har norðuri í Italia, vórðu bjargaðir mánadagin.

Teir báðir menninir viltust í einari líð oman fyri býin Cortina D'ampezzo, tá myrkur kom á teir. Við einari fartelefon eydnaðist teimum at siga skyldfólkunum frá, at teir vóru vilstir, men tá teir skuldu greiða bjargingarmonnunum frá, hvar teir vóru staddir, var battaríið í fartelefonini tómt.

Nú vóru góð ráð dýr, men teir báðir bretarnir funnu upp á ráð. Annar teirra hevði eitt myndatól, og við blitzinum eydnaðist tað teimum at vísa bjargingarmonnunum, hvar teir vóru staddir, skrivat norska tíðindastovan.

# Skal hava viðgingið morðið á Onnu Lindh

**Mijailo Mijailovic skal hava sagt mammu síni, at hann fekk eyga á uttanríkisráðharran inn í NK-handlinum**

LINDH-MORÐIÐÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað vóru skyldfólk hjá tí 24 ára gamla Mijailo Mijailovic, sum søgdu svensku løgregluni, at tað var hann, sum leyp á og stakk Onnu Lindh, uttanríkisráðharra í NK-handlinum í Stockholm tann 10. september.

Sambært blaðnum Expressen skal maðurin hava sagt mammu síni, at hann hevði myrt ráðharran. Tað var nakrar fáar dagar aftan á morðið, og skyldfólk teirra gjørdu av at boða løgregluni frá.

Expressen veit eisini at siga, at tann 24 ára gamli hevði greitt mammuni frá, hvussu hann var rýmdur av morðstaðnum, og at hann hevði leigað ein hýruvogn úr miðbýnum í Stockholm.

Sambært Expressen kendi mamman sonin aftur á myndunum úr NK-handlinum, tá tær komu í bløðini og sjónvarpið. Tá sonurin so gjørdi av at raka alt hárið av høvdinum, skilti hon, at hon, at hann mundi hava sagt satt. Hon greiddi nøkrum skyldfólkum frá tí, sum sonurin hevði sagt, og tey boðaðu løgregluni frá, skrivar Expressen.

Tann 24 ára gamli maðurin hevur noktað seg sekan undir avhoyringum, men sambært keldum í Stockholm heldur løgreglan seg hava so góð prógv ímóti manninum, at hann verður dømdur sekur kortini.

# Halifax í undantaksstøðu



*Myndugleikarnir í Kanada settu mánadagin býin Halifax á eysturstrondini í undantaksstøðu, eftir at ódnin Juan hevði herjað býin. Ódnin gjørdi rættiliga stóran skaða, og umleið 80.000 fólk mistu streymin*

*Mynd: Reuters*

# Norðurkorea hóttir aftur

**Norðurkoreanska stýrið sigur seg hava sett í verk tiltøk, sum skulu styrkja landsins evni at hótta við kjarnorkuvápnum.**

KJARNORKUVÁPN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Norðurkorea ger nú aftur vart við seg.

Hesaferð boðar stýrið í Pyongyang frá, at tað hevur sett í verk tiltøk, sum eru ætlað at styrkja landsins evni at hótta við kjarnorkuvápnum. Útlendskir eygleiðarar tulka hetta sum eina ávaring til USA um ikki at seta eitt sokallað fyribyrgjandi álop á Norðurkorea í verk.

Samstundis ger stýrið greitt, at tað hevur ongan áhuga í at halda fram við samráðingunum við USA, Russland, Kina, Japan og Suðurkorea um landsins kjarnorkuvápn. Londini samráddust í Beijing herfyri, at Norðurkorea sigur, at samráðingarnar vóru nyttuleysar, og at eingin orsøk er til at taka tær uppaftur.

Sambært norðurkoreansku tíðindastovuni KCNA hevur USA eittans endamál við samráðingunum, og tað er at avvápna Norðurkorea.



















## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir einum fólki til kommunuskrivstovuna.

Starvið fevnir m.a. um at svara telefonini, røkja arkiv, arbeiða við bókhaldi og annars øllum vanligum skrivstovuarbeiði.

Tann, ið settur verður, má hava góð samstarvsevnir og skal eisini kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi innan 15. oktober 2003.

Umsóknir v.m. skulu sendast til:

**Tvøroyrar kommunu**
Postboks 80
800 Tvøroyri

## Útbjóðing

Í sambandi við útbygging av Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík verður hervið alment boðið út:

**Betongarbeiðstøkan.**

Útbjóðingartilfarið fæst við at venda sær til Teknistovuna í Gøtu innan 6. oktober við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi
á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Lisitatiónin verður mikudagin 22. oktober 2003 kl. 15.00 á Eysturoyar Røktar- og ellisheimi.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen ráðg. byggifrøðingar
FO-510 Gøta
tlf. 442105 · fax 44210
e-mail: klement@post.olivant.fo

## MINI-Hondbóltur

**hjá Kyndli byrjar mikudagin 22. oktober kl. 17.00**

**Aldur: 5 – 8 ár**

**KYNDIL**
**www.kyndil.fo**

## Motorsúkkla

Lítið brúkt CZ 180 cc motorsúkkla, árg. 1996, bíliga til sølu.

**Tlf. 373666 eftir kl. 18.00**

**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29

## Lærlingur

**søkist til handilin hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali at seta skjótast gjørligt.**

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt gott arbeiðspláss, har tú í einum spennandi starvi fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Fjølbroyttar uppgávur, sum gera at tú fert at læra nógv og skjótt

**Tú kemur at taka tær av at:**
- Taka ímóti og avgreiða viðskiftafólk, sum kemur í handilin ella gjøgnum telefon
- Samskifta við og bíleggja vørur frá veitarum okkara uttanlands
- Taka móti innkomnari vøru frá veitarum okkara og halda skil á eykalutagoymslu

**Vit vænta okkum av tær, at:**
- Tú ert ágrýtin, fryntlig/ur og fyrikomandi
- Tú ert álítandi og før/ur at átaka tær ábyrgd

**Førleika- og útbúgvingarkrav:**
- FHS ella onnur miðnámsútbúgving

**Umsókn verður at senda til:**
P/F Esmar Simonsen,
Att. Jonni Isaksen, Kambsdalur,
530-Fuglafjørður.

*P/F Esmar Simonsen er ein handils- og tænastufyritøka, sum hevur sølu- og verkstaðsvirksemi innan bilar og trukkar. Vit umboða merkini Daewoo, Still, Caterpillar og nógv onnur merki. Harumframt hava vit ein handil, har m.a. bil-eykalutir og dekk verða seld. Í fyritøkuni starvast 13 fólk.*

## Reingerðarfólk til Føroya Læraraskúla

Lýst verður eftir reingerðarfólki til Føroya Læraraskúla.

Arbeiðstíðin er allar skúladagar frá kl. 14.30 til 18.00.

Starvið verður sett frá 1. nov.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Fíggjarmálaráðið.

Tey, ið vilja hava meira at vita, kunnu seta seg í samband við skúlatænaran Jóna Johannesen, á telefon 313508 ella 213508.
Teldupostur til skúlatænaran kann sendast til joni-johannesen@hotmail.com

Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi innan 20. oktober 2003.

*Tórshavn, 26. sept. 2003*

**Føroya Læraraskúli**
Postrúm 348
110 Tórshavn